# Nú fréttast tíðindi í Televarpinum

**Rás 1 hjá Televarpinum er nú farin í luftina við tíðindum og lýsingum**

ALTERNATIVT SJÓNVARP
*Tíðindaskriv*




*– Við tíðini skal Rás 1 gerast ein alternativ føroysk sjónvarpsrás, sigur Laila Hentze, stjóri í Televarpinum. Hon sigur, at tíðindini á Rás 1 verða borin fram á ein øðrvísi hátt – tey eru ein samanrenning av sjónvarpi, interneti og tíðindablaði, sigur hon*

Fyri tíð síðani byrjaði Rás 1 hjá Televarpinum at royndarsenda. Nú er arbeiðið við at samskipa ymiskt tilfar komið so væl áleiðis, at Televarpshaldarar m.a. kunnu fáa tíðindi hvønn tíma gjøgnum Rás 1. Rás 1 sendir í samstarvi við Sosialin og Portalin tíðindi og kunning. Samstarvið er liður í menningini av Rás 1, sum við tíðini skal gerast ein alternativ føroysk sjónvarpsrás.

– Tíðindini verða borin fram á ein annarleiðis hátt – ein samanrenning av sjónvarpi, interneti og tíðindablað, sigur stjórin í Televarpinum, Laila Hentze.

Annað kunnandi tilfar verður somuleiðis at finna á Rás 1 í næstum.

Somuleiðis verður møguligt at fáa lýsingar á Rás 1. Skipanin við at leggja lýsingar inn á Rás 1 er ment í samstarvi við KT-fyritøkuna Kervi. Skipanin ger tað møguligt hjá lýsingarstovum at leggja tilfarið hjá lýsarunum beinleiðis á Rás 1. Somuleiðis verður møguligt hjá lýsingarstovunum at fara inn í eina verandi lýsing fyri at broyta ella dagføra hana, um lýsarin vil. Hesin hátturin letur upp fyri nýggjum møguleikum hjá lýsarum at koma út til kundarnar.

Nýggjasta útbyggingin í talgilta sendinetinum hjá Televarpinum er Inni á Firði í Kollafirði.

www.sosialurin.fo

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og um morgunin regn, annars yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, sunnudagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 14 stig.

– – –

Eisini apríl var lýggjur, 6,9° móti 4,9°. Avfallið var nær miðal, 93,2 mm móti 96,0 mm.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 9 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 19 |
| Malta | – |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 23 |
| New York | 11 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 30 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 5 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 973 hPa. vestan fyri Skotland fer spakuliga í landsynning. Eitt annað lágtrýst, 980 hPa. eystan fyri Ísland grynnist.




Lágtrýstið yvir Írska Havinum grynnist, men brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/05 kl. 06[00]– 04/05 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,5°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,4 mm – mált frá 03/05 kl. 06[00]–04/05 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mai: 7,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. mai: Fullmáni
6. mai: Mánin næstur jørðini
11. mai: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. mai | 07.30 | 19.56 | 06.30 | 18.56 | 06.45 | 19.11 | 09.30 | 21.56 | 10.30 | 22.56 | 05.45 | 18.11 | 04.45 | 17.11 | 07.45 | 20.11 | 08.45 | 21.11 | 07.15 | 19.41 | 08.30 | 20.56 |
| 6. mai | 08.23 | 20.53 | 07.23 | 19.53 | 07.38 | 20.08 | 10.23 | 22.53 | 11.23 | 23.53 | 06.38 | 19.08 | 05.38 | 18.08 | 08.38 | 21.08 | 09.38 | 22.08 | 08.08 | 20.38 | 09.23 | 21.53 |
| 7. mai | 09.24 | 21.55 | 08.24 | 20.55 | 08.39 | 21.10 | 11.24 | 23.55 | — | 12.24 | 07.39 | 20.10 | 06.39 | 19.10 | 09.39 | 22.10 | 10.39 | 23.10 | 09.09 | 21.40 | 10.24 | 22.55 |
| 8. mai | 10.27 | 22.58 | 09.27 | 21.58 | 09.42 | 22.13 | — | 12.27 | 00.55 | 13.27 | 08.42 | 21.13 | 07.42 | 20.13 | 10.42 | 23.13 | 11.42 | — | 10.12 | 22.43 | 11.27 | 23.58 |

5 707265 100036 >